## Ikki upp í ES nú

Í Íslandi vilja fiskiskipaeigararnir fegnir hava myndugleikarnar at hækka summar kvotur. Á ársfundi hjá reiðarafelagnum LÍÚ í gjár segði formaðurin, Björgólfur Jóhannsson, at leiðslan í felagnum hevur havt samband við fiskimálaráðharran fyri at fáa hann at leggja 30.000 tons oman á verandi veiðihámark. Formaðurin hjá reiðarunum nam eisini við tað nógva kjakið, sum hevur verið í seinastuni um íslendskan limaskap í ES. Sjálvur er hann ikki fyri limaskapi, og hann helt tað vera burturvið at tosa um at fara upp í ES, nú landið er á knøunum, sum hann tók til.

## Írar vilja merkja makrel

Írar hava nú søkt um at sleppa at seta umhvørvismerki á makrel, sum verður útfluttur. Tað upplýsir Marine Stewardship Council (MSC), sum sigur seg hava fingið umsókn frá írum. Írland hevur loyvi at fiska góð 49.000 tons av makreli, men umsóknin um umhvørvismerking umfatar bara 6.500 tons ella 13 prosent av kvotuni, sigur MSC. Írar hava 17 skip, sum fiska makrel á leiðini vestan fyri Írland og niður ímóiti Biscayavíkini. Tann stóri makrelurin verður útfluttur til Russlands og Japan, og tað smáa fer til Russlands, Japan, ES, Egyptalands og Vesturafriku.

# Eingin avgerð um ólógligan fiskiskap

**Eystari Landsrættur útsetti viðgerðina av rættarmálinum móti einum russiskum fiskiskipara, sum í Føroya Rætti í mai varð dømdur fyri at hava fiskað ólógliga á Bill Baylie bankanum**




*Russiski trolarin, Ross, kom á Kollafjørð í mai og liggur har framvegis*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

ÓLÓGLIG VEIÐA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var 16. mai í ár, at tveir russiskir trolarar vórðu tiknir fyriu at hava fiskað ólógliga í føroyskum øki á Bill Baylie bankanum.

Talan var um trolararnar Ross og Isotop, sum báðir fiskaðu í sama øki. Teir vórðu fylgdir á Havnina, og har varð hald lagt á veiðina, sum hjá Ross var mett til 149.000 krónur og hjá Isotop varð mett til 132.500 krónur. Hartil varð hald eisini lagt á ein trolposa hjá Isotop, sum var 130 millimetrar.

Sektaruppskot varð lagt fyri báðar trolararnar sum skuldu rinda 100.000 krónur umframt veiði og trolposa. Men so long tíð gekk at fáa svar, at myndugleikarnir tann 26. mai kravdu málið fyri Føroya Rætt, og dagin eftir kom málið so fyri.

Endin var, at Føroya Rættur staðfesti ólógligu veiðina, og dømdi skipararnar at rinda 100.000 krónur í bót í part, umframt at hald varð lagt á veiði og trolposa.

Báðir russararnir skutu dómin inn fyri hægri rætt, og málið var so fyri í Eystara Landsrætti mikudagin.

Av tí at annar skiparin var til skips, møtti bert hin, men av tí at málini vóru so lík, metti Landsrætturin, at tey kundu viðgerðast saman.

### Skeiv kort

Skiparin segði seg vera í góðari trúgv, tí teir høvdu fingið kort frá myndugleikunum í Murmansk, og tey kortini vístu, at teir fiskaðu í NEAFC-øki í altjóða sjógvi.

Men hetta var kortini ikki so, tí Føroyar hava í 1999 gjørt avtalu við Stórabretland um gráa økið millum londini, so at tað nú er miðlinjan, sum er markið.

Men uttan mun til tað, fiskaðu russisku trolararnir innan fyri føroyska markið, og koordinatirnir, sum myndugleikarnir í Murmansk nýttu, eru frá 1976, og altso undan tí, at føroyska fiskimarkið varð flutt frá 12 út á 200 fjórðingar.

So føroyski ákærin dugdi illa at síggja, hvussu russisku myndugleikarnir ikki vita, hvar føroyska fiskimarkið gongur.

Ført var fram í Eystara Landsrætti mikudagin, at bæði kort og plottaraútskriftir vísa, at trolararnir týðiliga fiska innan fyri føroyska fiskimarkið.

Ákærin førdi fram, at ein annar russiskur trolari úr Murmansk fiskaði í júst sama øki, sum hesir báðir trolararnir gjørdu, og at dómur um hetta frá 2001 fyriliggur. Tá varð víst til júst sama skeiva kort, sum nú verður víst til.

Ákærin vísti somuleiðis á, at russar eru kunnaðir um avtaluna við bretar frá 1999, og hann kravdi tí, at dómurin í Føroya Rætti varð staðfestur.

### Váttaði kunngerðina

Sambært frágreiðing frá Árna Ólafson er grundlinjan gjølliga gjøgnumgingin saman við russiska ambassadørinum í Keypmannahavn, og víst var til, at ólógligi fiskiskapurin er farin fram í føroyskum sjógvi eisini undan broytingunum í 1999 í sambandi við avtaluna við bretar.

Jurij Piskarev, russiskur sendiharri í fiskivinnumálum, hevði fund við Fiskimálaráðið, og hann viðgekk, at teir vóru kunnaðir um kunngerðina frá 1999 um avtaluna við bretar.

Russiski skiparin førdi fram, at ongar aðrar koordinatir eru kunngjørdar russum uttan tær frá 1976, men hesum vísti ákærin aftur.

Verjin vísti til nøkur e-mails har sagt verður, at ein feilur er gjørdur í New York, men hetta vísti seg at vera onkur feilur á einari heimasíðu hjá ST.

Somuleiðis vísti verjin til, at skipararnir høvdu givið inn mótmæli í sambandi við ólógligu handtøkuna, sum teir málbóru seg.

Seinna mótmælið varð stílað til bæði Fiskimálaráðið og løgmann, har kravt verður, at ólógliga arrestin verður tikin aftur og at endurgjaldskrav verður reist mótir ólógligu afturhaldingini.

### Málið útsett

Rættarsalurin var stúgvandi fullur, tí ein flokkur á Sjómansskúlanum hevði valt at møta upp og fylgja við málinum. Men málið dró út, og tá nýggjur rættarfundur skuldi byrja klokkan 13.30, var ikki annað at gera, enn at útseta málið til víðari viðgerð í Keypmannahavn.

Verjin vísti eisini til almenn føroysk dokument, har lastin varð kannað til tess at staðfesta, at veiðan samsvaraði við dagrapportina. Og har vóru ongar viðmerkingar gjørdar.

Men ákærin vísti til, at hesar »port-of-state« frágreiðingarnar einans verða gjørdar til tess at staðfesta, at veiðan samsvarar við dagrapportina, og ikki tekur hædd fyri, hvar fiskurin er fiskaður.

Sum nevnt varð málið útsett til seinni, men enn er ikki heilt greitt, nær tað verður tikið upp aftur í Keypmannahavn.